ítróttur

Nr. 229 • týsdagur • 30. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo



## Johan í essinum

Síða 24-25

# B68 hevur beina kós uppeftir

**Um vikuskiftið gjørdist greitt, at Jann Ingi Petersen fer at spæla við B68 komandi kappingarár**

B68
*Jákup Mørk*

Toftamenn tykjast ikki vera í iva. Teir skulu upp aftur í bestu deildina, og tað kann á ongan hátt ganga nóg skjótt fyri seg.

Tað hevur longu verið greitt leingi, at tey á Toftum ikki ætlar sær at dvølja leingi í næst bestu deildini, og nú tykist felagið so hava fingið tilgongd av enn einum leikara, sum man teljast millum teir stinnastu í landinum.

Tað er Jann Ingi Petersen, sum eftir eitt ár í Fremad Amager nú setir kósina heimaftur. Tosað varð annars um tað heilt stóra ævintýrið, tá hann í fjør heyst fór til Fremad Amager, men eftir eina hampuliga góða byrjan í felagnum, hevur tað fyri tað nógva gingið afturá seinasta hálva árið.

– Eg havi valt at koma aftur til Føroya at byrja av nýggjum. Eg vil hava »mítt« pláss á landsliðnum aftur og eg vil fegin spæla fótbólt hvørt vikuskiftið. Tað hevur verið ørkymlandi at sita á beinkinum í Danmark væl vitandi, at eg framvegis kundi havt spælt í Føroyum, segði Jann Ingi Petersen við Dimmalætting fríggjadagin.

Nú er so greitt, hvar fótbólturin skal spælast, og einki er at ivast í, at tey á Toftum eru fegin um, at tey nú hava fingið enn ein profil á liðið, sum í 2005 skal prógva, at niðurflytingin ikki var meira enn eitt óheppið fyribrigdi.

# 480 minuttir við mansverju

**Tað tykist mær nyttuleyst at spæla, tá eg í samfullar 60 minuttir skal haldast burturi frá øllum, heldur stórskjúttin hjá VÍF**

MANSVERJA
*Jákup Mørk*



*Hóas støðugu mansverjuna, so er Ioana enn at finna ovarliga á máltindunum, men sjálv sigur hon, at verandi støða er fullkomuliga drepandi fyri gleðina við hondbóltsspælinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eitt av vápnunum, sum venjarar ofta taka til, tá tættir dystir skulu koppast rætta vegin, er mansverja.

Við at taka ein týðandi leikara á mótstøðuliðnum úr spælinum, er málið tá oftast at órógva javnvágina hjá hinum. Forða teimum í at sjóta avgerandi málini, og á tann hátt fáa stigini í egnan part.

Við hvørt verður slík mansverja umrødd sum eitt framúr taktiskt trekk av venjaranum, men tað finnast eisini dømi, har hetta fer út um mark.

Eitt slík er uttan iva verjan, sum Ioana Rápa hevur verið offur fyri í ár. Tað er einki dulsmál, at rumenski stórskjúttin hjá VÍF hevur harðastu vinstru hondina í føroysku kvinnudeildini, og tí vilja mótstøðuliðini helst gera nógv, fyri at forða henni í at avrika alt ov nógv.

Tað hevur Ioana eisini fyri langari tíð síðani góðtikið, men kortini heldur hon, at stuttleikin nú er um at fara av spælinum.

– Sum støðan hevur verið í ár, so havi eg verið mansvard frá at kalla fyrsta minutti í hvørjum einasta dysti. Eg dugi væl at skilja, um hetta verður gjørt, tá tættir dystir skulu avgerast, ella sum eina roynd at venda einum dysti. Men tað kann væl ikki vera meiningin, at ein góður spælari als ikki skal sleppa at spæla. Sjálvandi er eingin lóg, sum forbjóðar mansverju, men spælararnir máttu um ikki annað havt somikið av virðing fyri spælinum, at hetta ikki varð gjørt somikið konsekvent, heldur hon.

– Sjálv má eg í øllum førum siga, at hetta drepur allan hugin at spæla. Eg veit, at tá eg traðki fram um miðstrikuna, stendur ein spælari klár at taka ímóti mær, og so má eg bara bíða. Fái eg loksins møguleika til skot, eri eg sum so ikki til reiðar til hetta, tí tú ert jú als ikki upphitað. So vildi tað verið til nógv størri gleði hjá mær sjálvari, um eg bara var heima saman við manni og barni og hugnaði mær, er turrisliga staðfestingin hjá henni.

Og við at líta á dystirnar higartil í ár, ber illa til at geva Ioanu annað enn rætt. Hóast munurin í nógvum førum hevur verið stórur annan vegin, so hevur mansverjan støðugt verið partur av spælinum hjá mótstøðuni. Eisini hóast dystirnir væl og virðiliga hava verið avgjørdir.

# Neistin fer ígongd

Sum vit skrivaðu í seinastu viku, so arbeiddu kreftir í Neistanum við eini ætlan, har felagið skal byggja egna hondbóltshøll við Landavegin.

Eftir at áhugafelagið í longri tíð hevur arbeitt við ætlanunum, var málið nú komið somikið langt, at hetta varð lagt fyri aðalfundin at taka støðu til.

Eykaaðalfundur varð hildin sunnudagin, og her var breið undirtøka fyri, at tað skal arbeiðast víðari við projektinum.

Tað vil ikki siga, at talan er um nakra endaliga góðkenning frá limunum, men meira ein tilsøgn um, at nevndin kann arbeiða víðari við málinum. Soleiðis verður farið undir at gera eitt at kalla skitsu-projekt, har ein kostnaðarmeting samstundis verður gjørd.

Tosað hevur verið um eitt projekt áleið 18 mió kr., og arbeiðið frameftir fer so at staðfesta, um hetta er ein upphædd, sum hevur samband við veruleikan, ella um ætlanin skal leggjast á hillina.

Tá úrslitið av hesum er greitt, verður málið lagt fyri nýggjan aðalfund til støðutakan.

42 fólk vóru møtt á eykaaðalfundin hesaferð. Av teimum atkvøddu 41 fyri uppskotinum. Ein atkvøða var blonk.

**-jm**

# Góð rútmukapping

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Havnar Fimleikafelag hevur, sum størsta fimleikafelag í landinum, tikið á seg at skipa fyri kappingum innan felagið eins væl og at skipa fyri kappingum, har fimleikarar úr øðrum feløgum kunnu luttaka.

Nú Havnar Fimleikafelag hevur 95 ár á baki, er tað ein sannroynd, at bæði fimleikarar, venjarar og aðrir fyriskiparar eiga æruna, at felagið kann loyva sær at síggja fram til nógv góð fimleikaár afturat.

Eitt tiltak, ið sigast kann, reiðiliga at seta dám á fimleikaárið, er rútmukappingin, ið seinastu 4 árini hevur drigið mangar fimleikarar út á Stórheygg at sýna síni kynstur.

Fimleikararnir, ið meldað til kappingina, seta saman lið við fýra ella fimm fimleikarøð, ið síðani verður víst fram í kappingini. Ymsar treytir eru til fimleikarøðina og við øllum teimum frálíku venjingunum fimleikararnir vístu fram sunnudagin, var sjón fyri søgn, at fimleikurin í Føroyum hevur ment seg nógv seinastu árini.

Í ár var sunnudagurin 21. november dagurin, ið settur var til rútmukappingina. Eins og undanfarnu árini varð býtt í bólkar eftir aldri. Av tí at fimleikararnir vóru nógvir, vóru teir býttir í 3 bólkar. Í hvørjum bólki vóru eini 6 - og í hvørjum liðið vóru 4-5 fimleikarar. Ein vinnarabólkur skuldi síðani kjósast í hvørjum bólki.

### Vinnarar í rútmukappingin 2004 hjá Havnar Fimleikafelag

**Bólkur 1**
1 Smá stjørnuskot

**Bólkur 2**
1 Lucky girls
2 Stjørnurnar
3 Super star

**Bólkur 3**
1 Sash
2 Super star
3 Butterflyes

Nógvir áskoðarar vóru til kappingina, sum var sera spennandi. Fólk fóru glað til húsar aftur eftir væleydnað tiltak, ið fimleikarar og áskoðarar longu nú kunnu gleða seg til verður aftur komandi ár.